# Sum í tropunum á Vágsbøi

**Eyðun og Terji spældu ikki bert út um pallkantin, men uppum regnið, og tú gloymdi eina løtu hvussu keðiligt veðrið var á Summarfestivalinum.**

Niels Uni Dam
nielsuni@sosialurin.fo

Skal nakað jaligt dragast fram um allar seinkingarnar í flogferðsluni til Summarfestivalin, so er tað tað, at ein bólkur sum Eyðun og Terji flutti úr Flagsteltinum upp á stóra pallin, har teirra tónleikur í veruleikanum hoyrdi heima.
Tað regnaði illa, meðan Eyðun og Terji spældu, men áskoðararnir gloymdu regnið - mest sum flýggjaðu til tónleikin og kendu seg sum í tropunum.
Hesir báðir eru tveir av størstu føroysku sangskrivarunum nakrantíð, og løgini, ið teir spældu, eru øll fólkaogn. Her vóru løg av útgávum hjá Frændum, Føstufressum, Moirae, Eyðun og Terja og Eyðun Nolsøe og Summarfestivalurin sang við.
Summarfestivalurin er ein fólkaveitsla, eitt slag av Norðoyarstevnu við tónleiki. Til eina tílíka fólkaveitslu er tónleikurin hjá Eyðun og Terja heilt perfektur. Hetta var ein ferð í føroyska lagaskattinum, tá hann er best. At tónleikurin so oman á alt er væl spældur, ger bara alt nógv stuttligari.
Tá nógv túsund fólk sungu við til løg, sum Tú, Millum mussarnar, Dansa, Dupult song, Eg flýggi til tónleikin, Hvussu kann eg vita, 80'ini og nógv onnur, vitnaði tað um tí heilt serligu støðu, ið Eyðun og Terji hava í føroyskari mentan.
Eyðun og Terji høvdu stutt sagt eina av bestu framførslunum á festivalinum.



*Eyðun tyktist veruliga tendraður á heimavølli
Mynd:Álvur Haraldsen*

# Anfinn fekk lív í Vágsbø



*Anfinn sang Í skúri og øll hini hittini og Summarfestivalurin sang við
Mynd: Niels Uni Dam*

**Anfinn & Co hevði eina trupla uppgávu, at fara á pallin eftir boðini um, at Shu-Bi-Dua ikki komu alíkavæl, men hesa uppgávu megnaðu teir væl.**

Niels Uni Dam
nielsuni@sosialurin.fo

Anfinn hevur ein stak góðan bólk við sær, og teir spældu væl kontrirokkin hjá Anfinni. Hittparadan var sera long. Løg sum Parabol, Caramba, Mítt hjarta pumpar fyri tær, Klumpar í Sósini, Útsalg og Sirkus Tinganes vóru bert nøkur av nógvu syngi við slagarunum, sum rungaðu um Vágsbø. Anfinn er undirhaldandi á pallinum á ein "Jógvan Ósá"kendan hátt, og hann fekk veruliga lív í fjøldina. Fólk hugnaði sær veruliga. Anfinn og Co var eitt stuttligt og gott innslag í fólkaveitsluni, ið Summarfestivalurin leggur seg eftir at vera.
Anfinn & Co hevur nógvar av kvalitetunum, ið eisini eyðkenna Shu-Bi-Dua: Stuttligir tekstir og fangandi og løtt løg, tó eru løgini hvørki líka góð, ella tekstirnir líka stuttligir og viðkomandi sum teir hjá donsku stórubeiggjunum. Mest av øllum so er Anfinn ikki Michael Bundesen. Tó at hann gjørdi eina fína Bundesen parodi.
- Shu-Bi-Dua eru lendir alíkavæl! Eg veit ikki hvussu hetta ber til, eg fekk bara at vita, at eg skuldi presentera teir, segði Sjúrður Skaale, áðrenn Anfinn og Co komu á pallin at spæla eykaløg, Anfinn ílatin sum Michael Bundesen við kaskettinum umvendum á høvdinum og opnari svartari skjúrtu og hvítari undirtroyggju.
Teir spældu "Står på en alpetop" og hetta var eitt slag av plástri á sárið hjá teimum, ið nú ikki sluppu at hoyra tí veruligu vøruna.